


*Tingini at spæla við eru nógv í tali. Eftir nógvar regndagar í farnu viku, blíðkaði hann veðrið fríggjadagin, soleiðis at tey sluppu út við súkklunum - eisini til heiðurs fyri myndamannin*

## Ein hendinga selli og sella

Runavíkar kommuna, sum Skáli er partur av, skrivaði fyrr í ár út eina navnakapping til nýggja stovnin.

Inn komu fleiri uppskot, og átti Torbjørn Jacobsen vinnandi uppskotið.

Í grundgeving síni vísir Tobbi á, at orðið "sellin" (úttalast sedlin) er eitt sjáldsamt orð, sum hann av óvart rendi seg í á fyrstu síðu í føroysku týðingini av Løgtings Søgu Føroya, sum A.W. Brøgger var liðugur at skriva í Oslo í juni 1937. Bókin er ognað Jóanesi Petursson, sum sjálvur føroyskaði hana við góðari hjálp frá Christiani Matras og Rikardi Long.

Her stendur m.a. soleiðis skrivað: "Tað var ikki fyrrenn í 18. øld at farið varð at skriva upp. Tann fyrsti var Jens Christian Svabo, tann hendinga sellin, sum sat í Keypmannahavn ...".

Orðið er snøgt og kann brúkast sum heiti á stovni, og hartil er hjávinningurin hann, serliga táið tað ræður um ein barnagarð, har børn av báðum kynum skulu húsast, at orðið verður brúkt bæði sum kvennkyns- og sum kallkynsorð.

Um eina sellu verður sagt, at tað er ein prúð og mannfólkalig kona, og um ein sella verður sagt, at tað er ein djarvur og sterkur maður, knassi.

At enda vísir Tobbi á, at nýggj ættarlið av føroyingum skulu húsast í nýggja stovninum á Skála - menniskju úr øllum slektum, av øllum sløgum og úr nógvum ymiskum sosialum høpum.

- Endamálið hjá kommununi, og teimum sum skulu reka stovnin er, at gera afturvendandi nýggj ættarlið av føroyingum til fyrimyndarligar borgarar, táið tey skulu arva samfelagið frá okkum sum fara og teimum, sum eru farin undan okkum.

- Slíkur stovnur eigur at verða rikin soleiðis, at sagt kann vera um tey sum hava fingið partvísan uppvøkstur haðani, at hann ella hon er ein hendinga selli ella sella.



*Tey minnu børnini hava góðar umstøður at spæla inni. Um eina løtu munnu tey eisini fara útum at spæla*

til spæliplláss, og skilt frá hinum er parkeringsøkið norðanfyri barnahúsið. Millum hesi økini liggur tann nýggi og væl innrættaði stovnurin.

Higartil er bert helvtin av barnahúsinum tikið í nýtslu. Sum vanligt er, hava tær ymisku stovurnar eisini hvør sítt navn og hvør sítt eyðkenni hjá gimsteinum.

Heldur ikki her hevur ein latið tilvildina ráða: Onnur stovan eitur Tinnan og hin Perlan. Seinni verða stovurnar Smaragd og Safir lætnar upp.

- Vit hava valt hesi nøvnini, tí at vit hvønn einasta dag fáa nakrar gimsteinar ella gullklumpar lætnar upp í hendur av foreldrunum, sigur Nancy Poulsen um tey børnini sum í dag og framyvir fara at hava sína gongd her á Selluni.

**Tað ynskja vit eisini, at tað næsta ættarliðið skal verða: Børn sum fara hiðani av stovninum, bæði røsk og sterk**

NANCY POULSEN, LEIÐARI



*Nógvar góðar løtur fáast við reiggjunum. Hesi bæði mugu tó hava hjálp at sleppa upp í reiggjuna, men tað syrgja tey 11 starvsfólkini fyri at hjálpa teimum við*

*snorri@sosialurin.fo*